


## Kaj skoraði beinanvegin

Kaj Ennigarð gjørdi skjótt av, tá hann spældi fyrsta dystin fyri nýggja felag sítt leygardagin. KÍ var á Sandi og spældi venjingardyst, og dysturin endaði við 2-0 sigri til KÍ. Kaj Ennigarð skoraði longu í sjeynda minutti, tá hann skallaði bóltin í málið eftir innlegg. Nýggi álopsspælarin hjá KÍ, Chris Ceroni, skoraði seinna málið í seinna hálvleiki. Eisini Gunnar Nielsen og Kareem Smith spældu fyrsta dystin fyri KÍ.

*mynd: www.ki.fo*

## Kvinnurnar spæla um steyp í Havn

B36 hevur tikið stig til eina steypakapping millum B36, KÍ, GÍ og EB/Streym. Kappingin skal spælast í Havn leygardagin 17. mars og verður fyrireiking hjá feløgunum til nýggja kappingarárið. Ætlanin var, at silvurvinnararnir úr AB skuldu verða við í kappingini, men liðið fer á venjingarlegu í Suðuroy sama vikuskiftið, og tí spælir EB/Streymur við ístaðin.

# t hjá Drátti




*Spælið bylgjaði støðugt aftur og fram, men tá seinasti bólturin var sligin, stóð Dráttur eftir sum steypavinnari 2007*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

an, og tá tær komu á odda 5-0 valdi Dráttur at taka Time Out. Hetta steðgaði góðu gongdini hjá KÍF, og lítla løtu seinni stóð á jøvnum 6-6, og so gekk javnt á næstu løtuna.

Ein sat tó alla tíðina við einum følilsi av, at KÍF kundi fara frá Drátti í hesum settinum. KÍF spældi ótrúliga fjølbroytt í álopinum, og blokkurin var byrjaður at fáa fatur á álopinum hjá Drátti. Tað vísti seg eisini, at hetta var settið hjá KÍF. Mitt í settinum fóru tær frá 14-14 uppá 22-16, og so var so gott sum liðugt.

Rannvá Dam slapp at smasha síðsta bóltin í gólvið til 25-21, og aftur hesaferð var KÍF betra liðið. Tær spældu sera fjølbroytt í triðja setti, og allir leikararnir tóku ábyrgd.

### Helga var fantastisk

Dráttur leyp avstað í fjórða setti. Tær løgdu seg á odda 9-3 mset sum alt fyri eitt, og longu tá hevði KÍF valt at taka sítt fyrsta Time Out. Hetta vísti seg slett ikki at geva nakað munagott úrslit. Dráttur helt bara á fram við sínum góða og ágangandi spælið, og KÍF fekk ikki eitt bein til jørðina í hesum settinum.

Leikararnir hjá Drátti vóru ótrúliga sterkir í gólvinum, tær kempaðu um hvønn bólt, og so var blokkurin sera sterkur í fjórða setti. KÍF hevði alla tíðina trupulleikar at fáa bóltin fram við blokkinum, og fleiri ferðin blivu smashini frá KÍF blokkaði beint niður í aftur gólvið hjá teimum sjálvum.

Ein leikari skaraði tó fram úr hjá Drátti. Helga Nordendal hevði spælt ein sera góðan dyst longu undan hesum settinum, men her tók hon veruliga ábyrgd fyri Drátt. Hon var ótrúlig í blokkinum, og hon vann fleiri bóltar við góðum og hørðum smashum.

Munurin millum liðini bara vaks og vaks, sum fjórða sett leið. Mitt í settinum førdi Dráttir 17-6, og til síðst tóktist KÍF geva fullkomiliga upp. Dráttur vann ein knúsandi 25-8 sigur, og so skuldi javnbrótari til fyri at finna ein vinnara.

### Spenningurin helt sær

Dráttur fekk betru byrjanina uppá javnbrótaran, og fyrstu bóltarnar høvdu tær munin. Tær megnaðu eisini at leggja seg fram um 7-4, men munurin á liðunum var ikki stórur, og fleiri av bóltunum vóru bæði langir og spennandi, áðrenn teir blivu avgjørdir.

KÍF kempaði tó væl aftur. Tær komu uppá 7-7 við góðum og fjølbroyttum spæli, og nú var líkt til, at KÍF hevði eina lítla yvirvág. Dráttur var tó liðið, sum legði seg á odda 8-7, áðrenn liðini býttu síðu.

KÍF hevði ongantíð verið á odda í fimta setti undan síðubýtinum, men hetta gjørdu tær alt fyri eitt eftir síðubýti. Tær komu á odda 9-8, men so steðgaði upp. Eftir hetta vann Dráttur fimm bóltar á tað, og bráðliga vísti talvan 13-9 til Drátt, og løtu seini 14-10, og nú var eingin sum ivaðist í, at Dráttur fór avstað við sigrinum.

KÍF vildi tó ikki geva skarvin yvir. Tær kempaðu nú við øllum tí tær áttu, og tær megnaðu eisini at verja seg uppá 14-13. So kom servan, sum skuldi vísa seg at blíva tann síðsta í dystinum. Hesin bólturin bleiv sera spennandi, og í fleiri førum fingu bæði liðini næstan ómøguligar bóltar uppaftur av gólvinum. Serliga KÍF kempaði fyri lívinum, men at enda máttu tær ásanna, at blokkurin hjá Drátti var ov sterkur henda dagin. Síðsti bólturin bleiv nevniliga sligin í blokkin og niður í gólvið, og so vann Dráttur steypafinaluna fyri fyrstu ferð í søguni.

Fólk blivu vitni til ein sera góðan og spennandi dyst, sum kundi farið báðar vegir, men at enda dró Dráttur longra stráið, og etta mundi eisini vera í lagi, tí teir høvdu vunnið sær eina rættiliga trygga leiðslu í síðsta settinum.

# Møttu einum góðum liði

Vónbrotið var sjálvandi stórt hjá kollfirðingum eftir ósigurin í steypafinaluni ímóti Drátti. Ein av venjarunum, Kristjan Mikkelsen, helt tó, at leikararnir hjá Drátti vóru vælupplagdar henda dagin.

- Tað er sjálvandi eitt stórt vónbrot at tapa enda dystin, men eg haldi virkiliga, at leikararnir hjá Drátti vóru sera væl upplagdir henda dagin. Vit tosaðu nógv um undan dystinum, at blokkarnir fóru at vera avgerandi, og her haldi eg, at blokkurin hjá Drátti gav okkum stórar trupulleikar til tíðir. Vit blivu eisini ov varin í servunum ímóti endanum, og hetta gjørdi, at tær høvdu lættari við at taka ímóti, og tað er sjálvandi spell.

Kristjan segði seg tó føla, at KÍF átti onkran bólt í fimta og seinasta setti, sum tær ikki fingu.

- Eg má tó siga, at eg helt virkiliga, at vit fingu onkra døming ímóti okkum í fimta setti, sum týðiliga átti at verið dømd til okkum, og hetta er sjálvandi nakað, sum ein situr og hugsar um nú. Eg ivist tó onga løtu í, at Dráttur eisini fekk okkurt ímóti sær, og hetta er helst nakað, sum kemur fram, tá man hevur tapt eina steypafinalu, segði Kristjan at enda.

**-teitur**

# – Hetta var keðiligt

Kvinnurnar hjá KÍF vóru í síni fyrstu steypafinalu í flogbólti um vikuskiftið, og tíverri fyri tær, so endaði hesin dysturin við einu ósigri. Sólrun Petersen helt, at leikararnir helst ávirkaðust nakað av nervum ígjøgnum dystin.

- Hetta var ordiliga keðiligt, men soleiðis bleiv tað bara. Vit byrjaðu at fáa nervar síðstu settini, og so tora vit ikki ordiliga at sláa ígjøgnum, tá vit hava møguleikan, og so riggar bara ikki heilt. Í síðsta setti eru vit langt aftanfyri og koma sera væl aftur ímóti endanum, men aftur her sær tað út til, at vit gerast heldur bangnar, og so kiksa vit.

Sjálvt um KÍF tapti dystin, so gleddist Sólrun um, at liðið hevði verið í síni fyrstu steypafinalu, og at dysturin bleiv spennandi.

- Hetta var fyrsta ferðin, at vit hava verið í eini steypafinalu, og tað er sjálvandi gott. Tað er sjálvandi keðiligt at tapa, men eg haldi tað tó vera deiligt, at dysturin bleiv spennandi, segði ein nakað skuffað Sólrun eftir dystin.

**-teitur**




*Vónbrotið var stórt, tá KÍF hevði tapt seinasta bóltin. Tær høvdu alt, men tær vóru kortini bara áskoðarar, tá gullið skuldi handast*

*Mynd: Álvur*